# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# GUNNAR VERÐUR STÓRI MAÐURIN



Dimmalætting hevði um vikuskiftið sítt boð uppá, hvør kemur at mynda ovastu leiðslu í Eik Banka. Sambært hesi meting er Gunnar í Liða besta boðið upp á nevndarformanssessin, meðan Súni Schwartz-Jacobsen er besta boðið upp á Eik-stjóra.

Boðini hjá Dimmalætting eru mikið áhugaverd, hóast vit bæði kundu lagt afturat og drigið frá. Men so sum bæði Dimmalætting og Sosialurin hava víst á, so hevur Tryggingarfelagið Føroyar ein marghátligan bygnað, líkur tí, sum gamli Eik Banki hevði.

Tí er tað í veruleikanum ovasta leiðsla í Tryggingarfelagnum Føroyum, sum sjálv ger av, hvør myndar leiðsluna. Gott nokk er tað umboðsráðið sum velur nevndarlimir, men tað er sum oftast avtalað frammanundan. Um stutta tíð skulu nakrir nevndarlimir veljast. Okkara boð er, at Gunnar í Liða bæði verður valdur í nevndina í TF Holding og í nevndina í Eik Banka. Skal hann verða formaður í nevndini í Eik Banka, hví skal hann so ikki eisini verða formaður í TF Holding?

Gjøgnum Eik Banka eigur tryggingarfelagið nú í nógvum vinnuvirkjum, so sum skipasmiðju, alifelag, snikkaravirkjum, útflutningsfyritøkum og Fastogn, sum eigur fyri út við hálva milliard í vinnubygningum kring landið.

Bigir Mohr passar ikki so væl inn í hasa myndina av banka- og tryggingarmonnum. Hann hevur verið sýslumansskrivari á Sandoynni og virkin javnaðarmaður. Tað vóru í sínari tíð kvalifikatiónir at fáa okkurt politiskt bein at gnaga, men neyvan eru tað kvalifikatiónir, sum banka- og tryggingarfólk meta hægst. Tí gita vit, at Birgir Mohr glíður úr nevdnini í TF Holding, meðan Gunnar í Liða verður valdur í staðin.

Vit halda, at Tryggingarfelagið Føroyar skal broytast, so tað fær ein meira gjøgnumskygdan bygnað. Hetta eigur at vera gjørt beinanvegin, nú felagið er vorðið so sjónskt og fingið so stóra ávirkan á føroyskt vinnulív. Umboðsráðið átti beinanvegin at broytt nevndarbygnaðin í felagnum, so tað líktist meira eini partafelagsnevnd. Tað gevur onga meining at velja fólk í slíka nevnd at sita í fýra ár. Tað kundi verið ein byrjan, soleiðis at »eigararnir«, – gloymið nú ikki, at tryggingartakararnir eru veruligu eigararnir – kundu fingið eina ábending um, at vilji er til at broyta myndina av Tryggingarfelagnum Føroyum frá at vera ein tungur mastodontur við einum diffusum eigaraskara til eina modernaða marknaðardrivna fyritøku, sum kann stimbra og eggja privatum fyritaksemi.

**» Gloymið ikki, at tryggingartakararnir eiga Tryggingina**

# Í kríggj móti lýsnum



Mánadagurin 31. januar er ásettur at vera almennur lúsadagur í Føroyum eins og í fleiri øðrum Norðanlondum.

Lýs er ein stórur trupulleiki fyri smábørn og skúlabørn.

Gigni – Heilsufrøði til børn & ung og Apoteksverk Føroya hava nú í fleiri ár samstarvað um at fyribyrgja og basa lús. Afturvendandi átakið nevnist lúsakríggj, og verður tað mánadagin í næstu viku, 31. januar 2011.

- Fyrt at steðga smittuni av lýs er neyðugt, at øll børn verða kannað sama dag. Tí fara vit við hesum átaki at heita á foreldur um at kemba barni teirra mánadagin 31. januar, sigur Gigni í tíðindaskrivi.

Kunning um lús, smittu, viðgerð og kembing liggur á www.gigni.fo
www.apotek.fo

# Nú er Bjarni fastur á tingi



Á løgtingsvalinum seinast varð Bjarni Djurholm ikki afturvaldur. Fólkaflokkurin fekk sjey tingfólk vald. Bjarni Djurholm og Heðin Zachariassen fyri báðir 317 atkvøður, meðan Óli Breckmann fekk 312. Av tí at tað stóð á jøvnum, varð lutakast, og tað vann Bjarni Djurholm, sum soleiðis gjørdist fyrsti varamaður hjá Fólkaflokkinum.

Eftir at trý av tingfólkunum hjá flokkinum komu í landsstýrið, komu allir tríggir varamenninir á ting. Tá nú Jørgen Niclasen fór úr landsstýrinum og fer aftur í tingið, so má síðsti varamaðurin víkja sæti. Tað er Óli Breckmann.

Men av tí at Anfinn Kallsberg leggur frá sær, so varðveitir Óli Breckmann sæti á tingi. Hinvegin er Bjarna Djurholm ikki longur varamaður. Hann hevur nú fastan sess á tingi.

Tá Anfinn Kallsberg leggur frá sær, fer hann endaliga úr tinginum. Hann hevur sagt seg úr starvi og kann ikki koma aftur í tingið. Skal hann á ting aftur, so skal hann veljast á einum løgtingsvali.

Anfinn Kallsberg er annars tann av verandi tingmonnum, sum hevur sitið næstlongst á tingi. Hann varð fyrstu ferð valdur 8. novem ber í 1980. Tann einasti í tinginum nú, sum hevur sitið longri enn Anfinn Kallsberg, er Óli Breckmann.



So tað má metast sum lagnunnar speisemi, at Anfinn Kallsberg soleiðis tryggjar Óla Breckmann sæti restina av valskeiðinum - sjálvandi treytað av, at Fólkaflokkurin verður verandi í landsstýrissamgonguni...



**» Neyð lærir nakna kvinnu...**

UNI NÆS
KJAK Á SÍÐU



**» Skýggja Staðanavnanevndina?**

ROLF GUTTESEN
KJAK Á SÍÐU

# Nógv virksemi í ungdómshúsinum




Nógv virksemi í ungdómshúsinum í Hoyvík DJ og VJ SHOW við Pandaboy, Sunflower og DJ Neiz verður 29. januar og nýtt ungdómsráð er nú stovnað í KLUBB 188.

Týskvøldið 18. januar var skipað fyri einum valkvøld í »Klubb 188«, sum ungdómshúsið í Hoyvík eitur, har veljast skuldi eitt ungdómsráð. 12 ung vóru í uppskoti, men einans fimm skuldu veljast. Tá atkvøðurnar vórðu taldar, so bleiv ungdómsráðið manna við tveimum, úr 6. og 7. flokki og trimum úr 8. flokki og eldri.

Ungdómsráðið fer at hava tætt samstarv við samskiparan, har tey fara at bera ynskir frá teimum ungu fram.

Tað fyrsta sum verður á skránni verður enn eitt fjølbroytt DJ og VJ SHOW, hetta verður longu leygarkvøldið 29. januar 2011 í »Klubb 188«. Opið verður frá kl. 21.00 - 02.00. Kostnaður: 50 krónur. Tað verður nógv ymiskt spennandi á skránni, eitt nú kann nevnast at DJ verða: Pandaboy, Sunflower og DJ Neiz. Eisini verður eitt stórt surprice, so tað er nógv at gleða seg til.

Ungdómshúsið í Hoyvík hevur fingið eina sera góða byrjan upp á 2011. Bygnaðurin í ungdómshúsinum er broyttur nakað, soleiðis at tað nú er aldursmark á fríggjakvøld og leygarkvøld, og tey hava økt um upplatingartíðirnar og hava nu opið tríggjar ferðir um vikuna. Samstundis er Bjarni Beder settur sum samskipari í Klubb 188 frá 1. Januar. 2011.

- Vit gleða okkum til eitt spennandi 2011, har tey ungu fara at seta sín dám á ungdómsvirksemi. Alt virksemi í KLUBB 188 fer fram í rúsfríum umhvørvi og aldursmarkið er frá 13 til 18 ár, sigur Levi Mørk, leiðari.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*